# SYÐRADALUR

Fólkatal: 6 (2017). Klaksvíkar kommuna. / *Population: 6 (2017). Municipality of Klaksvík.*








Her ert tú
*You are here*

Hjartastartari
*Defibrillator*

WC og brúsa
*Toilet and shower*

Parkering
*Parking*

Gongugøta
*Walking path*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

Visit Norðoy

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

## FO

Høga staðsetingin sermerkir bygdina Syðradal, ið er hin yngsta á Kalsoynni. Húsini daga undan sum smáir skansar ovarlaga í stóra dalinum, og mongu grótlaðaðu bygningarnir gera ein gongutúr í bygdini til eina uppliving í sær sjálvum.

### Søga

Í 1809 leyp skalvur oman móti bygdini á Blankskála á vestaru síðu á Kalsoynni. Skalvurin fór í tvíningar beint oman fyri bygdina, so skaðin var lítil. Skelkurin hevði tó við sær, at bygdarfólkini fluttu yvir í stóra dalin syðst á eystursíðuni á Kalsoynni. Í 1816 var liðugt at endurreisa húsini, og Syðradalur sá dagsins ljós. Komandi øldina mentist bygdin, og í 1955 búðu 70 fólk á Syðradali. Í nógv ár var M/B Barsskor lívsæðrin hjá Kalsoyingum. Fólk og vøra kom á land á bryggjuni, men gøtan niðan í bygdina var bæði drúgv og brøtt at ganga við byrði á baki. Tað var tí stórt framstig, tá ið rennistrongur varð spentur upp í 1965, og tilfar og vøra kundu hivast niðan eftir stronginum. Størsta nýbrotið í nýggjari tíð var tó í 2005, tá ið ferjulegan varð tikin í nýtslu, og fólk og viðføri kundu verða koyrd til dyrnar. Fólkatalið á Syðradali er – eins og í nógvum øðrum smáplássum – minkað nógv seinastu øldina, og í dag hava fá fólk fastan bústað á Syðradali. Friðsæla bygdin er tó eitt vælumtókt frítíðarpláss, sum skiftir ham um summarið, tá ið nógv fólk vitja hana.

### Minnisvarðin

Á leið 1000 fólk vóru savnað á Syðradali, tá ið minnisvarðin (1) varð vígdur tann 8. juli í 2000. Árni Ziska av Strondum hevur evnað høggmyndirnar á steininum, har tú sært bát við manning á aðrari síðuni, og seyðamaður er avmyndaður á ovaru síðu. Steinurin er fingin úr Kunoy. Árni Ziska hevur somuleiðis høgt nøvnini inn í hellurnar, ið standa laðaðar oman fyri varðan í hálvrundingi.

### Siðbundna spæliplássið

Hylurin (2) miðskeiðis á Syðradali hevur altíð verið eitt livandi spælipláss hjá børnum. Hylurin hevur eina lítla kai, og er vælegnaður at vassa og spæla í. Stóristeinur (3), har børn á Syðradali plagdu at venja síni bjargakynstur, stendur eitt sindur longri niðri í bygdini. Ein togendi er framvegis festur ovast á steininum, sum stendur klárur at taka ímóti nýggjum klintrarum.

### Skúlin

Skúlin á Syðradali (4) varð bygdur í 1886, og er ein siðbundin bygningur frá hesum tíðarskeiði. Í langa tíð skiftust næmingarnir um at ganga í skúla á Syðradali og á Húsum – eina viku í senn. Skúlin hevur staðið tómur síðani 2005, men verður framvegis nýttur til skeiðvirksemi og sum bygdarhús.

### Íbygdir steinar

Fleiri sagnir eru um íbygdar steinar á Syðradali. Sagt verður frá manni á Syðradali, sum boraði hol í ein stein oman fyri minnisvarðan (5), tí hann ætlaði at spreingja hann burtur. Ein huldumaður, sum búði í steininum, kom til hansara í dreymi, og bað mannin um at tetta takið aftur, tí tað lak niður á konu og børn hansara. Dagin eftir legði maðurin flag út yvir holið, og síðani hevur steinurin fingið frið.

### Gongutúrur suður á Vitan

Vitin á Syðradali (6) varð bygdur í 1893 og er ímillum elstu vitar í Føroyum. Túrurin fram við bakkanum suður til vitan er ein lættur og vakur túrur. Set 15 minuttir av til gongutúrin hvønn vegin, og minst til at steðga við staðið, har „maðurin á Toftini" sigst at hava búð – langt áðrenn fólk búsettust á Syðradali (7). Av vitanum er frálíkt útsýni norður ígjøgnum Kalsoyarfjørð og út á hav. Eystanfyri sæst yvir í Føgrulíð, har háskúlin einaferð stóð. Sunnanfyri daga Gøtunes, Mjóvanes og Borðoyanes undan, áðrenn havsbrúgvin letur seg upp í ein sunnan.

## EN

*Its high location distinguishes the village of Syðradalur – the youngest village on Kalsoy. The houses appear like little lighthouses high up in the valley, and the many stone buildings make a walk through the village an experience in itself.*

### History

*In 1809 a large snowdrift tumbled towards the village Blankskála on the western side of Kalsoy. The snowdrift split into two parts just above the village, and there was very little damage. The alarm caused the villagers to move to the large valley on the southernmost end of the eastern side of Kalsoy. In 1816 the houses were rebuilt, and the village of Syðradalur was born. The following centuries the village grew, and by 1955 seventy people lived in Syðradalur. For many years the ship m/b Barsskor was the lifeline of the residents of Kalsoy. People and goods came ashore at the quay, but the path up to the village presented an arduous and steep walk when carrying goods. Significant progress was made in 1965 when a telpher line was installed, and this made it possible to pull the goods up to the village. The biggest development of late was in 2005 when the ferry berth was put to use, and people and baggage could be driven to the door of the house. The population in Syðradalur has – like many other small, remote villages – decreased this past century significantly, and today very few people are permanent residents in Syðradalur. The peaceful village is a popular holiday retreat, and it transforms during the summer when many people visit the village.*

### The Memorial Monument

*Around 1000 people were gathered in Syðradalur when the memorial monument (1) was consecrated on the 8th July 2000. Árni Ziska from Strendur has made the sculptures on the stone. On one side you see a boat with its crew, and on the other, you see a shepherd. The stone is from Kunoy. Árni Ziska has also sculpted the names into the rocks above the cairn that are set up in a semi-circle.*

### The Traditional Playground

*The pond (2) in the middle of Syðradalur has always been a lively playground for the children of the village. The pond has a little quay and is suitable for wading and playing. Stóristeinur (3), where the children of Syðradalur used to practice rock climbing can be found further down the village. A rope is still fastened to the top of the rock, ready to welcome new climbers.*

### The School

*The school in Syðradalur (4) was built in 1886 and is a traditional building from this period. For a long time the pupils alternately attended school in Syðradalur and Húsar – one week at a time in each place. The school has stood empty since 2005 but is still used for holding courses and functions as the village hall.*

### Inhabited Rocks

*There are several legends about inhabited rocks in Syðradalur. The story goes that there was a man from Syðradalur who drilled a hole into a rock above the memorial monument (5) because he wanted to blow up the rock. A 'huldumaður' – a grey elvish man – who inhabited the rock came to him in his dreams and asked the man to patch the roof because the rain was leaking onto his wife and kids. The following day the man covered the hole with turf, and the rock has stood undisturbed ever since.*

### Hiking South to the Lighthouse

*The lighthouse in Syðradalur (6) was built in 1893 and is among the oldest lighthouses in the Faroe Islands. The hike along the hill south to the lighthouse is an easy and lovely walk. Allow 15 minutes for the hike each way, and make sure to stop by the place where it is said „maðurin á Toftini" – the man in the house ruin – once lived, long before people settled in Syðradalur (7). From the lighthouse there is a magnificent view to the north through the fjord of Kalsoy and out to the open ocean. To the east you can see Føgrulíð where the folk high school once stood. To the south Gøtunes, Mjóvanes and Borðoyanes come into sight before the horizon opens up.*

### Ver ein hjálpirót

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

### Be a helping root

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

### Tá ið tú fert til fjals

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

### Hiking advice

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

## VIT VIÐMÆLA

### Á seiðabergi fram við landi

Syðradalur er eitt satt paradís hjá teimum, ið vilja sleppa á seiðaberg. Fólk á Syðradali bera orð fyri at vera serliga sterk, tí tey hava etið livur og nógvan seið, sum fæst fram við landi og suður í Galvin, sum er av bestu seiðaplássum í landinum. Um tú vilt fylgja í fótasporunum hjá teimum gomlu, sum fóru á seiðaberg á Syðradali, so er Eltræið (8) – ein stórur steinur sunnan fyri bygdina – at viðmæla. Góð fiskimið eru tó á kaiini og ferjuleguni. Gamalt er, at stórseiðurin kemur inn undir land á hálvarðsøku 15. mai, og hann er at fáa til langt út á heystið.

### Góð ráð úr Syðradali

Fert tú á seiðaberg, minst til bjargingarvest og góðar skógvar. Tað rekur hart fram við landi.

## LOCAL'S CHOICE

### Fishing Along the Shore

*Syðradalur is a veritable paradise for those who wish to go fishing on the shore. The people of Syðradalur are said to be very strong because they eat liver and a lot of coalfish. These can be caught along the shore and to the south at Galvin, and it is said to be one of the best places in the Faroes for fishing coalfish. If you want to follow in the footsteps of the old villagers that used to go fishing by the shore in Syðradalur, we recommend Eltræi (8) – a large rock to the south of the village. Good fishing grounds can also be found at the quay and the ferry berth. It is said that the larger coalfish came close to the shore on 'Hálvarssøka' on the 15th May and that they could be caught there well into the fall.*

### Local's Good Advice

*If you go fishing along the shore, then please remember to wear a safety jacket and appropriate footwear. The current is very strong by the shoreline.*